

www.oljan.fo

**Jan Müller** 18 - 03 - 2013

# Enn eitt stórt Statoil-fund í Eysturafrika

Tey bæði altjóða oljufeløgini, Statoil og ExxonMobil, sum eitt nú arbeiða saman í Føroyum, hava gjørt sítt triðja stóra gassfund út fyri Tanzania í Eysturafrika. Tað var í fjør, at feløgini raktu við stórar gassgoymslur út fyri Tanzania og kemur hetta triðja fundið eftir stuttari tíð sera væl við hjá feløgunum, sum eisini arbeiða við eini stórari LNG-útbygging. Verða nøgdirnar, sum eru funnar á teimum trimum gassleiðunum, umroknaðar til tunnur av olju, so svarar tað til 3 milliardir tunnur av olju. Hetta er líka nógv, sum mest bjartskygdu metingarnar vilja vera við, finst í risafundinum Johan Sverdrup í Norðsjónum. Stjórin hjá Statoil fyri altjóða leiting, Tim Dodson, sigur, at feløgini hava staðið fyri eini sera stórari og væleydnaðari borikampanju, sum hevur víst seg at geva góð úrslit. Higartil eru boraðir 5 leitibrunnar og hildið verður fram við at bora brunnar í ár. Leitingin í Eysturafrika er partur av altjóða strategiini hjá Statoil, har lagt verður eftir at finna váðilig øki kring heimin við stóorum møguleika fyri at gera stór fund. Eysturafrika er eitt av teimum. Hetta er í tráð við royndirnar hjá Statoil at gerast enn meira sjónligt á altjóða pallinum. Statoil, sum er fyristøðufelag fyri leitingina í Eysturafrika, fekk tillutað loyvi har í 2007 og hevur síðani tá havt skrivstovu í havnabýnum Dar es Salaam. Herfyri gjørdi Statoil sáttmála við føroyska frálandareiðaríið Skansi Offshore um at brúka Eldborg í arbeiðinum á gassleiðunum út fyri Tanzania. Eldborg hevur verið ávegis til Eysturafrika úr Norðsjónum nú í fleiri vikur.

